# Kundavegleiðing – heilsuváttan

**Bólkalívstrygging og Restskuldartrygging**

**Lógarreglur og tryggingartreytir**
Vanligu ásetingarnar í føroyskum rættarreglum um tryggingaravtalur og føroysk lóggáva annars verður nýtt, í tann mun at ásetingarnar í bólkalívsavtaluni ikki víkja frá lógini.

Fyri bólkalívsavtaluna eru tær, til eina og hvørja tíð galdandi "Tryggingartreytir fyri Bólkalívstrygging", galdandi.

**Hví skal eg geva upplýsingar um mína heilsu?**
Tú skalt svara nøkrum spurningum um tína heilsu, fyri at NordikLív kann meta um, um tíni heilsuviðurskifti eru ein øktur tryggingarváði, tá tú verður innlimað/ur í tryggingina. Tað er sera týdningarmikið, at tú svarar øllum spurningunum nágreiniliga, annars ert tú í ringasta føri í vanda fyri at standa uttan fulnað, um skaðin hendir.

**Hví skal eg geva samtykki?**
NordikLív tekur, tá tryggingin verður teknað, við einum fíggjarligum váða. NordikLív hevur tørv á at kunna seg um hendan váðan, so treytirnar fyri tryggingina kunnu ásetast.

Upplýsingarnar, sum tryggingartakarin sjálvur hevur og minnist, eru ikki altíð nóg mikið fyri NordikLív. NordikLív hevur tí tørv á at fáa samtykki til at innheinta upplýsingar um t.d. innleggingar, viðgerðir v.m.

NordikLív innheintar bert tær upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at kunna meta um málið, og upplýsingarnar verða viðgjørdar í samsvari við reglunum í Dátuverndarlógini.

**Hvørjar upplýsingar skal eg geva?**
Tá tú ynskir at stovna ella broyta eina bólkalívstrygging, skalt tú útfylla eina heilsuváttan og møguliga onnur spurnabløð sum ískoyti.

Tá tú fyllir út heilsuváttanina og onnur spurnabløð, ert tað sera týdningarmikið:

- At tú svarar øllum spurningum
- At tú gevur upplýsingar um núverandi sjúkur
- At tú gevur upplýsingar um fyrrverandi sjúkur
- At tú gevur upplýsingar um varandi ella fyribils nýtslu av heilivági
- At tú gevur upplýsingar um kanningar og viðgerðir hjá góðkendum heilsupersónum (t.d. læknum, kiropraktorum ella fysioterapeutum), sjúkrahúsum og heilsustovnum.

Ert tú í iva, um hvussu tú skalt svara spurningunum, t.d. viðvíkjandi sjúkuavgerðum og dagfestingum, kanst tú seta teg í samband við tín lækna, áðrenn tú fyllir váttanina út. Læknin hevur ofta upplýsingarnar í sjúkradagbókini (journalini). Møguligt gjald hjá læknanum, verður **ikki** goldið av NordikLív.
Tú skalt tó ikki upplýsa um úrslit av arvafrøðiligum royndum, t.v.s. kanningar ið kunnu lýsa tínar ílegur og av tí treytaðan váða fyri framtíðar sjúkum.

**Ábyrgdin fyri, at oyðublaðið verður útfylt rætt, er tín og bert tín**
Tú skalt serliga geva tær far um trupulleikar við rygginum, sálarligar trupulleikar og rúsdrekka-misnýtslu. Summi hava lyndi til at fara lættliga um trupulleikar við rygginum ella at halda nýtslu av tablettum loynda. Onnur halda tað vera ringt at siga frá um t.d. sálarligar trupulleikar og kynssjúkur, men tú kanst trygt geva viðkvæmar upplýsingar.



P/F NordikLív Lívstryggingarfelag · Oknarvegur 5 · Postboks 3048 · FO-110 Tórshavn · banknordik.fo

Bert teir persónar, ið skulu viðgera títt mál, síggja tínar upplýsingar, og tey hava øll tagnarskyldu sambært lógini. Um tú ynskir tað, kanst tú skriva tær viðkvomu upplýsingarnar í eitt bræv og leggja tað í ein afturlatnan brævbjálva, stílaðan til læknan hjá NordikLív.

Um tú seinni kemur í tankar um okkurt, tú hevur gloymt at upplýsa, skalt tú venda tær til NordikLív.

**Hvat hendir við mínum heilsuupplýsingum?**
Tínar heilsuupplýsingar verða viðgjørdar í trúnaði og verða goymdar undir tryggum umstøðum. So leingi tú hevur tryggingina, varðveitir NordikLív tínar heilsuupplýsingar. Tá tín trygging endar, verða tínar heilsuupplýsingar strikaðar sambært reglunum í Dátuverndarlógini.

**Um skaðin hendir?**
Um ein skaði hendir og søkt verður um útgjald frá tryggingini, kann NordikLív innheinta upplýsingar um tíni heilsuviðurskifti. Heilsuupplýsingarnar verða innheintaðar við loyvi frá tær ella tínum avvarðandi, ið sita eftir, frá góðkendum heilsupersónum (t.d. læknum, kiropraktorum ella fysioterapeutum), sjúkrahúsum og heilsustovnum. Heilsuupplýsingarnar verða samanbornar við tey svar, sum tú gavst, tá tú stovnaði tína bólkalívstrygging.

Um tú gavst ósannar heilsuupplýsingar, tá tú stovnaði bólkalívstryggingina, kann títt endurgjald í ringasta føri falla burtur.

**Tryggingarveitari**
FG (Forenede Gruppeliv) er ein fyritøka, sum veitir tryggingar fyri ognarfeløgini hjá FG. FG er skrásett sum tryggingarveitari og fær samsýning fyri at veita tryggingar. Til ber at síggja ognarfeløgini hjá FG, og tú kanst lesa meira um tryggingarveiting á www.fg.dk. Á heimasíðuni kanst tú eisini lesa um, í hvønn mun FG veitir ráðgeving og kunning, og um hvørjir kærumøguleikar eru.

NORDIKLÍV

**Bólkalívstrygging nr. 98582 ☐**
**Restskuldartrygging nr. 98583☐**

# H e i l s u v á t t a n

Tú skalt **sjálv/ur** fylla út váttanina og svara **øllum** spurningum nágreiniliga. Tú mást ikki dylja nakað – heldur ikki, um tú heldur, at tað ongan týdning hevur fyri NordikLív.

Ivast tú, tá tú skalt svara spurningunum, t.d. viðvíkjandi sjúkuavgerð og dagfesting, kanst tú seta teg í samband við tín lækna, áðrenn tú fyllir út váttanina. Læknin hevur ofta upplýsingarnar í sjúkradagbókini. Tú hevur tó **sjálv/ur** ábyrgdina av upplýsingunum. NordikLív rindar **ikki** fyri møguligan kostnað til læknan. Er plásstrot niðanfyri, kanst tú leggja ískoytisupplýsingar hjá og minnast til eisini at undirskriva og skriva p-tal á skjølini.

**Bólkalívstrygging og Restskuldartrygging**

<table>
<tr><td colspan="3">Fornavn og eftirnavn</td></tr>
<tr><td colspan="2">Starv</td><td>P-tal</td></tr>
<tr><td>Bústaður</td><td>Postnr.</td><td>Bygd/býur</td></tr>
<tr><td>Hevur tú seinastu 3 árini leitað tær ráð, blivin kannað/ur ella viðgjørd/ur av lækna, kiropraktori, fysioterapeuti, sálarfrøðingi ella sálarlækna, fingið royndir gjørdar á royndarstovu, fingið heilivág útflýggjaðan eftir ávísing ella verið innløgd/innlagdur á sjúkrahúsi, dagdeild e.a.?<br>Nei ☐ Ja ☐</td><td colspan="2">Hvar? Fyri hvat? Nær? Hvussu leingi? Møguligar avleiðingar?</td></tr>
<tr><td>Ert tú undir endurútbúgving ella í tillagaðum starvi<br>Nei ☐ Ja ☐<br><br>Ert tú í uppskoti til ella fært tú eftirløn ella avlamisveiting frá tí almenna orsakað av tínari heilsu?<br>Nei ☐ Ja ☐</td><td colspan="2">Um ja: Hvør er orsøkin? Nær?</td></tr>
<tr><td>Hevur tú seinastu 10 árini verið sjúk/ur ella sjúkrameldað/ur í meira enn 1 mánað?<br>Nei ☐ Ja ☐</td><td colspan="2">Í sambandi við hvørja sjúku? Nær? Hvussu leingi? Møguligar avleiðingar?</td></tr>
<tr><td>Ja Nei<br>Ert tú fullkomiliga frísk/ur? ☐ ☐<br><br>Ert tú fult arbeiðsfør/ur? ☐ ☐</td><td colspan="2">Um nei: Hví ikki?</td></tr>
<tr><td colspan="3">Hvør er tín lækni? (skriva navn og bústað læknans)</td></tr>
</table>



P/F NordikLív Lívstryggingarfelag · Oknarvegur 5 · Postboks 3048 · FO-110 Tórshavn · banknordik.fo

Eg vátti, at allir spurningar eru svaraðir eftir bestu sannføring, og at eg ikki havi dult nakað. Eg veit, at skeivar ella ófullfíggjaðar upplýsingar, sum kunnu hava týdning fyri metingina hjá NordikLív av tryggingarváðanum, kunnu bera við sær, at tryggingin ikki veitir fulnað, um eg fái tørv á at seta fram krav um útgjald.

Eg samtykki, at onnur tryggingarfeløg, pensjónskassar, Arbejdsskadestyrelsen og aðrir góðkendir persónar í heilsuverkinum, sum eru við í viðgerðini av málinum, kunnu fáa innlit í upplýsingarnar. Upplýsingarnar verða strikaðar eftir galdandi reglum.

__________________________ tann / __________________________

undirskrift

NORDIKLÍV

# Samtykki:
# Tá ið eg skal tekna eina trygging ella broyta í trygging, sum eg longu havi

Lívs- og pensjónstrygging

Við míni undirskrift gevi eg hervið samtykki til, at NordikLív/Forenede Gruppeliv í sambandi við mína umsókn um at tekna ella broyta trygging kann heinta, nýta og lata víðari tær upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri viðgerðina av míni umsókn.

NordikLív/Forenede Gruppeliv heintar upplýsingar fyri at kunna gera eina meting um, hvørt eg kann og undir hvørjum treytum eg kann tekna eina trygging. NordikLív/Forenede Gruppeliv kann lata upplýsingar víðari í sambandi við at eyðmerkja meg (t.d. mítt p-tal) og aðrar viðkomandi upplýsingar um mína trygging og heilsu til teirra, sum NordikLív/Forenede Gruppeliv heintar upplýsingar frá. Tað er NordikLív/Forenede Gruppeliv, sum hevur ábyrgd av at nágreina og vísa teimum, sum upplýsingarnar heintast frá, hvørjar upplýsingar eru viðkomandi.

**Frá hvørjum kunnu upplýsingar heintast?**
Við hesum samtykki kann NordikLív/Forenede Gruppeliv, eitt ár eftir mína undirskrift, heinta viðkomandi upplýsingar frá:

- Mínum núverandi og fyrrverandi lækna
- Almennum og privatum sjúkrahúsum, klinikkum, deplum og starvsstovum
- Serlæknum, alisviðgerum (fysioterapeutum), kiropraktorum, sálarfrøðingum og Videncenter for Helbred og Forsikring (www.helbredogforsikring.dk).
- Øðrum, sum eg havi upplýst fyri NordikLív/Forenede Gruppeliv í sambandi við umsóknina um at tekna/broyta trygging.

Tey, ið eru nevnd omanfyri, kunnu við hesum samtykki, eitt ár eftir mína undirskrift, lata víðari viðkomandi upplýsingar til NordikLív/Forenede Gruppeliv.

**Til hvønn kunnu viðkomandi upplýsingar latast?**
Við hesum samtykki kann NordikLív/Forenede Gruppeliv í sambandi við at viðgera mína umsókn lata víðari upplýsingar til:

- Forenede Gruppeliv
- Videncenter for Helbred og Forsikring (www.helbredogforsikring.dk)

**Hvat slag av upplýsingum kunnu heintast, nýtast og latast víðari?**
Samtykkið fevnir um at heinta, nýta og lata víðari hesi sløg av upplýsingum:

- P-tal
- Upplýsingar um heilsu, undir hesum upplýsingar um sjúkur, sjúkueyðkenni og samband við heilsuverkið
- Upplýsingar um sosial og búskaparlig viðurskifti

**Samtykkið fevnir ikki um hesar upplýsingar:**

- Núverandi ella fyrrverandi heilsustøða hjá øðrum persónum, t.d. hjá familju
- Úrslit av íleguroyndum, sum eru gjørdar við tí endamáli at lýsa framtíðarváðan hjá umsøkjaranum fyri at fáa ávísar sjúkur
- Luttøku í og eisini úrslitið av fyribyrgjandi kanningum. Tó skal úrslitið av líknandi kanningum upplýsast, um talan er um núverandi sjúkutekin, ella um úrslitini vísa sjúku, ið umsøkjarin áður hevur havt, ella sum longu er byrjað

**Frá hvørjum tíðarskeiði kunnu upplýsingar heintast?**
Samtykkið fevnir um upplýsingar frá tíðarskeiði á 10 ár undan dagfestingini á hesum samtykki og fram til tann dag, tá ið NordikLív/Forenede Gruppeliv hevur tikið støðu til mína umsókn um at tekna ella broyta trygging. NordikLív/Forenede Gruppeliv kann við ítøkiligari grundgeving eisini heinta upplýsingar frá tíðarskeiði undan ásetta tíðarskeiðnum omanfyri, um grundarlag er fyri hesum.



P/F NordikLív Lívstryggingarfelag · Oknarvegur 5 · Postboks 3048 · FO-110 Tórshavn · banknordik.fo

NORDIKLÍV

**Skuldi tú angrað samtykkið**
Eg kann til eina og hvørja tíð taka samtykkið aftur við virknaði fyri framtíðina. At taka samtykkið aftur kann hava ávirkan á møguleikan hjá NordikLív/Forenede Gruppeliv at viðgera mína umsókn um at tekna ella broyta trygging.

| Dagfesting: | Undirskrift: | P-tal: |
|---|---|---|
| | | |



P/F NordikLív Lívstryggingarfelag · Oknarvegur 5 · Postboks 3048 · FO-110 Tórshavn · banknordik.fo